# Hólmgonga á Oyrarbakka

**Eysturoyartingmenninir Edmund Joensen og Tórbjørn Jacobsen bresta saman í politiskari duel í Eydnuni á Oyrarbakka hóskvøldið 3. februar kl. 20.00**

HÓLMGONGA
*tíðindaskriv*

Hólmgongan ímillum teir báðar er eitt afturvendandi tiltak framundir løgtings- & fólkatingsvalini í Eysturoy. Og verður av nógvum mett sum hæddarpunktið í valstríðnum, har skotið verður við skørpum millum pólarnar, og sekundvísarin ongan avgerandi leiklut hevur.

Fleiri ferðir hava politisku mótstøðumenninir úr Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum fylt losjuna í Gøtu á tremur við áhoyrarum, og hesaferð hevur løgtingsformaðurin heimavøll.

Báðir hava royndir av Løgtingi, úr Landsstýrinum og av Fólkatingi. Og áhoyrararnir fáa høvi til at seta teimum allar teir spurningar, ið koma teimum til hugs. Til at skipa og stjórna orðaskiftinum hava fyrireikararnir aftur hesaferð heitt á stjóran á Havsbrún í Fuglafirði, - Berg Poulsen.

Tónleikur verður eisini á skránni. Honum koma kendi trubadoururin Sámal Ravnsfjall og sambandsskrivarin Helgi Abrahamsen at skipa fyri, og skuldi hýrurin verið til tað, er ikki óvist at hólmgongu-menninir sjálvir gerast ein partur av tí musiska høpinum. Somikið er hent fyrr.

Onkur minnist kanska, at takið mundi farið av losjuni, tá ið glyvramaðurin sang á grønlendskum, og oyrarmaðurin plagieraði Vikingarna somikið væl, at fleiri ógvaðust um, at hann ikki var vorðin heimsgitin sangari heldur enn politikkari og vinnulívsmaður.

So, keðiligt verður tað neyvan á Oyrarbakka hóskvøldið.


www.fiskakeyp.fo
Ræstur fiskur, lippur, kjálkar, flak o.m.a.
Tit bíleggja, vit koyra til dyrnar!
SONNI FISKAKEYP
Tlf. 215335


# Umboðsmaðurin vil ikki viðgera kæruna

**Fólkatingsins Umboðsmaður vil ikki viðgera kæruna, sum danski Javnaðarflokkurin sendi honum, eftir at fíggjarmálaráðið hjá VK stjórnini hevði roknað uppá ætlanina "Made in Denmark" bert tveir dagar, áðrenn fólkatingsvalið var útskrivað**

FÓLKATINGSVAL
*Marjun Dalsgaard*

Fólkatingsins Umboðsmaður segði týsdagin í einum tíðindaskrivi, at hann ikki ætlar at viðgera kæruna, sum danski Javnaðarflokkurin sendi nakrar dagar inni í valstríðnum, um, at Fogh hevur misnýtt embætismenn í tænastu undir valstríðnum.

Orsøkin til kæruna var, at fíggjarmálaðráðið tíðliga í valstríðnum lak upplýsingar til fjølmiðlarnar um, at átta milliardir vænta í, skal ætlanin hjá Lykketoft, Made in Denmark, rigga. Útrokningarnar hevði fíggjarmálaráðið gjørt, áðrenn valið var útskrivað 18. januar. Ætlanin var løgd fram sunnudag 16. januar.

Made in Denmark skuldi vera stóri trumfurin hjá Mogens Lykketoft hetta valstríðið. Ætlanin skuldi skapa 100.000 nýggj arbeiðspláss í Danmark yvir 10 ár, men luftin fór, sum skilst, skjótt úr ballónini hjá javnaðarformanninum.

Lekin til fjølmiðlarnar um tær væntandi milliardirnar hevur møguliga skaðað trúðvirðið og harvið valstríðið hjá Javnaðarflokkinum, sum valdi at kæra til Fólkatingsins Umboðsmann við vón um at ein niðurstøða kom áðrenn valdagin 8.februar.

Umboðsmaðurin vil tó ikki viðgera kæruna. Orsøkina sigur hann vera, at ein slík kanning krevur, at prógv verða funnin fyri, at fíggjarmálaráðharrin Thor Pedersen tann 16. januar visti, at Fogh fór at skriva fólkatingsvalið út 18. januar. Haraftrat krevst prógv fyri, at tølini vórðu viðgjørd eftir, at Fogh hevði útskrivað valið.

Bæði politikarir og óheftir serfrøðingar høvdu at atburðinum hjá Thor Pedersen. Claus Haagen Jensen, ið er professari á lærda háskúlanum í Ålborg, segði seg ikki vera í iva í, at talan var um misnýtslu av embætismonnum undir valstríðnum. Hann helt tað vera sera lítið sannlíkt, at Thor Pedersen, sum situr í stjórn við Fogh, ikki visti 16. januar, at val fór at vera útskrivað 18. januar, og tað var tí skeivt av honum at seta útrokningar av einum valuppskoti hjá mótpartinum í verk.

# Nýggir undirvísingarhættir – royndir og úrslit

**Hetta er heitið á almennum fyrilestri, ið Allan Dresling, lektari, fer at halda seinnapartin hósdag**

FYRILESTUR
*Tíðindaskriv*

Í útbúgvingarverkinum verður áhaldandi arbeitt við at betra og nútímansgera undirvísingina. Hetta ger seg galdandi allan vegin frá fólkaskúlanum til universitetini.

Á nøkrum universitetum eru deplar, ið kanna og innføra nýggjar undirvísingarhættir. Her verða verk-ætlanir framdar, sum skulu geva stovnum, fakøkjum og lærarum íblástur til at menna og brúka nýggjar undirvísingarhættir.

Í fyrilestrinum verða dømi víst um nýggjar undirvísingarhættir við útgangsstøði í danska útbúgvingarverkinum. Røtt verður um, hvussu teir rigga og hvussu teir kunnu implementerast í undirvísingina.

Fyrilesturin verður á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni hósdagin 3. februar kl 15.30.




Vinnuhúsið søkir samskipara

## Fá vinnuna at spíra

**Vinnan hevur brúk fyri fólki við visjónum. Í hesum anda søkir Vinnuhúsið eftir samskipara at arbeiða við vinnumálum.**

Hevur tú sjónir um, hvussu vit menna møguleikarnar hjá vinnuni? Vilt tú vera við til at fáa verandi vinnur framá og fáa nýggjar spírar at næla? Og megnar tú bæði at arbeiða breitt og fara í dýpdina? So er tað tær, vit sóknast eftir.

Arbeiðsøkið hjá vinnusamskiparanum fevnir um vinnuviðurskifti í breiðum týdningi. Tú kemur at luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum, ið viðgera karmar og viðurskifti hjá vinnuni. Mál skulu lýsast, og tú skalt framleiða kanningar og frágreiðingar. Lógir og kunngerðir, ið ávirka vinnuna, skulu leggjast undir luppin, og tú verður við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum. Harafturat skalt tú røkja málsviðgerð og skrivarauppgávur fyri nevndir í vinnugreinafeløgunum.

Alt hetta krevur eitt ávíst samskifti við myndugleikarnar og serliga eitt tætt samstarv við vinnuna í Føroyum.

Vit vænta, at tú hevur hægri útbúgving, arbeiðsroyndir og fingurin á føroyska vinnupulsinum. Tú hevur góð samstarvsevni og arbeiðir bæði miðvíst og sjálvstøðugt. Tú orðar teg væl á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

Hevur tú hesar eginleikar bjóða vit tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi, har tú verður løntur eftir nærri avtalu.

Skrivlig umsókn við frámerkinum "starv" skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. februar 2005.
Vilt tú vita meira, kanst tú ringja til stjóran, Jan Mortensen, á telefon 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038
FO-110 Tórshavn

www.sansir.fo

Vinnuhúsið er felags skrivstova hjá 12 vinnufeløgum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møgulig kor. Tað verður gjørt við miðvísum arbeiði og kunning, ið kann geva politiska ávirkan. Feløgini veita limunum ráðgeving, taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum. Seks fólk starvast í Vinnuhúsinum.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Smærugøtu 9a, FO-100 Tórshavn, Tel 30 99 00, Fax 30 99 01, industry@industry.fo, www.industry.fo